**Viðtøkur fyri Lindbergs hús**

Samtyktar av setursráðnum 14.3.02

§ 1 Húsini bera navnið Lindbergs hús eftir gevaranum.

§ 2 Húsini verða serliga nýtt at hýsa fólki, sum koma úr øðrum londum annaðhvørt at lesa skeið ella undirvísa á Fróðskaparsetrinum ella gera vísindaligar kanningar føroyskum viðurskiftum viðvíkjandi.

§ 3 Rektarin ger av, hvør fær búrætt í Lindbergs húsi og hvussu leingi, eins og hann kann taka búrættin aftur, um fyritreytirnar ikki verða loknar ella hildnar, ella viðurskiftini hjá honum/henni, ið búrættin hevur, tala fyri, at so verður.

§ 4 Tey fýra búrúmini bera nøvnini Skúlans stova, Bóndans stova, Áarstova og Janusarstova eftir teimum búrúmum, sum Fróðskaparsetrið í síni tíð innrættaði í seturshúsunum á Debesartrøð fyri gávupening frá ávikavist Føroya Lærarafelag, Føroya Landsstýri, Tórshavnar býráð og Collegium Academicum Faroense (sbr. Kunngerð nr. 51 frá 20.06.1968: Reglugerð fyri búrúm Fróðskaparseturs Føroya).

§ 5 Stovan ber navnið Bjørksstova eftir E. A. Bjørk, fv. sorinskrivara (sum áður við testamenti hevur latið Fróðskaparsetrinum løgfrøðiliga bókasavn sítt).

§ 6 Dagliga umsjónin við húsunum áliggur setursskrivstovuni. Fyri innivist verður kravt gjald, sum setursráðið ásetir. Avrokning fer fram um setursskrivstovuna, ið eisini útflýggjar neyðugar húsareglur.